## Emil Olsen heldur flaggrøðuna í Fuglafirði

Flaggdagshald verður í Fuglafirði við bókasavnið mikudagin tann 25. apríl kl. 16.30. Emil Olsen heldur flaggdagsrøðuna, og Fuglafjar›ar hornorkestur spælir.

## Heðin Zachariassen heldur flaggrøðu í Hvalvík

Skótaliðið Borgin í Hvalvík skipar fyri Flaggdagshaldi við skúlan í Hvalvík týsdagin 25. apríl kl. 16:00.
Heðin Zachariassen, borgarstjóri og løgtingsmaður flytur fram røðu og Eiðis Ljómfelag spælir.
Skótar og róðrarfólk møta í Gamla skúla kl. 15:45, sigur Skótaliðið Borgin.

# Fløkt upp í ein ..matpakka

**Petur Simonsen, stjóri í Landsmiðstøðini sigur, at sjálvsagt skulu lærarar hava bæði rundstykki og hotell við fullari pensjón, tá talan er um eftirútbúgving.
- Ein munagóð eftirútbúgving krevur eisini góðar karmar, sigur hann**



*Seinasta matpakkaskeið var fyri snøggum mánaði síðani.
- Eftirmetingarnar frá tí skeiðinum tala sítt greiða mál, um at hetta er ikki nakað, sum verður góðtikið í 2007, sigur Petur Simonsen*

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

-Er tað ikki at fornokta veruleikan at rokna við, at lærarinnan av Viðareiði og lærarin úr Hvalba fara á skeið hjá LMS við trimum matpakkum, tveimum termokannum og bestikki í skjáttuni. Og hvat nú, um hon brúkar mjólk út í – ella sukurmolar? Soleiðis spyr Petur Simonsen, eftir at røddir í Mentamálaráðnum hava givið til kennar, at tey vilja heldur senda fleiri lærarar á skeið, enn at nýta pening til at ein drekkamunn og ein tey bita til teirra, sum fara á skeið hjá LMS.

### Kommunan ger bart

Í síðstu viku varð greitt, at luttøkugjaldið fyri lærarar, sum fara á skeið hjá Landsmiðstøðini (LMS) er vorðið trætumál millum land og kommunu. Seinastu árini hava kommunurnar goldið luttøkugjald á einar 100 – 200 krónur fyri skeið hjá lærarum. Men nú hevur í øllum førum Tórshavnar Kommuna skorið ígjøgnum, tí hetta er ikki teirra málsøki, og tí eiga landsmyndugleikarnir at rinda rokningina. Av Mentamálaráðnum varð sagt, at tey skilja væl, at skúlastjórarnir nú eru í villareiði, tí teir vita ikki hvagar teir so skulu senda rokningina.

- Vit hava ikki lagt upp fyri slíkum útreiðslum í Mentamálaráðnum, tí higartil hava kommunurnar goldið skeiðsgjaldið hjá lærarum, segði Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari á fólkaskúladeildini. Og hon vísti á, at tað er ein trupulleiki hjá teimum, at LMS tekur eitt gjald, sum millum annað verður nýtt til traktering av lærarum, tí MMR vil heldur nýta játtanina til eftirútbúgving til at senda fleiri lærarar á skeið, enn til drekkamunn og ein bita á middegi.

### Bert brotpartur

Petur Simonsen sigur, at LMS krevur eitt gjalda á 200 kr. fyri skeiðstilfar umframt kaffi á morgni og seinnapartin og ein bita á middegi. Hetta gjaldið verður kravt frá skúlunum.

- Sum prísirnir eru í dag, er tað helst øllum greitt, at eitt luttøkugjald á 200 kr. als ikki er eitt gjald fyri sjálva undirvísingina og ymsar útreiðslur í sambandi við instruktørin, eitt nú løn, flogferðaseðil, hotelluppihald, og heldur ikki til fyrisiting av skeiðunum, tí vanligu skeiðsgjøldini í dag eru oftast uml. 10 ferðir tað, sum LMS krevur í luttøkugjaldi, sigur hann.

### Loysir seg ikki

Hann spyr, hvat ger lærarinnuna av Viðareiði og læraran úr Hvalba so serlig, at tey skulu møta so kørgum umstøðum, tá skúlastjórin Hanus og varskúlastjórin Janus fara á skeið hjá MMR á Hotel Vágum við fullari pensjón, men uttan gjald.

- Tá sagt verður, at "vit heldur vilja nýta peningin til skeið til fleiri lærarar, enn til kost og uppihald til lærarar, sum fara á skeið", kanst tú av góðum grundum spyrja, hvat krónurnar til breyð á LMS-skeiði muna í mun til upphæddirnar til hotell við fullari pensjón á skeiðum sum onnur skipa fyri, hugleiðir Petur Simonsen, sum eisini vil verða við, at um sjónarmiðið er "meira til undirvísing og minni til mat og uppihald", so veit hann, hvar betri loysir seg at heinta nakað.

### Kargar umstøður

Petur Simonsen spyr eisini til matarsteðgin

– Hevur lærarinnan av Viðareiði ikki tørv á sosialari samveru við starvsfelagar úr Hvalba, Tórshavn og Fuglafirði samstundis, sum tey fáa eitt fakligt prát? Ella skal matarsteðgurin heldur brúkast til at royna at fáa okkurt etandi frá Keypssamtøkuni ella BurgerKing?

Av LMS verður sagt, at veruleikin um rundstykki heldur enn matpakkan kom fyri mongum árum síðani í LMS eins og allar aðrar staðir, har skeið og eftirútbúgving verður fyriskipað.

- At hesin veruleikin ikki er komin eina hædd upp her í húsinum, tá talan er um lærarar kann bara undra. Sjálvsagt skal vera pláss fyri bæði rundstykkjum og hotelli við fullari pensjón, tá talan er um eftirútbúgving av lærarum og leiðslum. Ein munagóð eftirútbúgving krevur eisini góðar karmar, sigur Petur Simonsen. So seint sum skúlaárið 2006-07 høvdu lærarar matpakka við, og seinasta matpakkaskeið var fyri snøggum mánaði síðani. '

- Eftirmetingarnar frá tí skeiðinum tala sítt greiða mál, um at hetta er ikki nakað, sum verður góðtikið í 2007, greiðir Petur Simonsen frá.

### Lands- ella kommunal uppgáva

Hann sigur, at ongin ivi er um, at eftirútbúgving er ein landsuppgáva, men at fleiri kommunur kenna eisini ábyrgdina av, at trivnaðurin hjá lærarunum er í lagi.

- Við hesum í huga er tað kanska ikki so sólarklárt, at kommunan eigur at sleppa undan at lata luttøkugjaldið. Praksis hevur so í hvussu er verið tey seinastu 3-4 árini, at kommunan hevur goldið, sigur hann.

Petur Simonsen sigur, at um strikurnar skulu kritast so snórabeint upp, sum tað nú letur til, er ivasamt hvørju megin strikuna útreiðslur til handbøkur og undirvísingartilfar til læraran liggja.

- Hvussu við telefonsamrøðum og hvussu við teldunýtsluni. Og havt við postgjaldinum fyri undirvísingarmiðlarnar, sum skúlar ókeypis læna frá LMS?. Hetta er bert okkurt av mongum, sum saktans kann gera strikuna krókuta.

### Nýggjur faldari

Sambært Petur Simonsen, er skeiðskráin hjá Eftirútbúgvingini fyri skúlaárið 2007-08 júst send út. Karmarnir eru bæði luttøkugjald, traktering og ferðaendurgjald.

- Uttan at reypa halda vit, at innihaldsliga er talan um eitt kærkomið og kvalifiserað tilboð til skúlarnar, sum kann verða gott ískoyti til neyðuga arbeiði alla tíðina at menna skúlan, og sum land og kommunur vónandi vilja standa saman um.

# Sovnaði við fullum drøni

**Í morgun var ein bileigari óvanliga heppin, tá ið hann sovnaði í bilinum**

HEPPIN Í ÓHAPPI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tíðliga sunnumorgin vórðu bæði løgreglan og sløkkiliðið í Havn boðsend til eitt óhapp av tí heilt sjáldsama slagnum.

Og líka sjáldsamt, óhappið var, líka heppin var ein bileigari, at hann ikki kom heilt illa fyri.

Bileigarin hevði verið í býnum og hevði fingið sær eina rættiliga góða kenning.

Klokkan sjey sunnumorgunin høvdu helst tey flestu havt fingið nóg mikið og ripa seg undir dýnuna

Men ikki okkara maður, nei, tí hann var enn í hopla og ætlaði sær avgjørt ikki at tørna inn.

### Hann vildi hoyra tónleik!

Men heima lá ikki so væl fyri at skrúva frá, so hann setti seg út í bilin at geva stereoanlegginum gass.

Hetta hevur helst verið av tí slagnum, har bilurin skal setast ígongd fyri at hoyra nakað.

Men maðurin hevur verið troyttari enn hevur havt varhugan av, tí alt í einum sovnaði hann- við fótinum á speedaranum.

Og tað endaði við, at motorurin við fullum drøni og at enda gekk hann so heitur, at eldur kom í bilin.

Men lukkutíð hevði ein granni varnast, hvat var áfatt og fekk boða løgregluni frá.

Løgreglan og sløkkiliðið komu rættiliga skjótt á staðið og fingu sovandi mannin úr bilinum.

Tá var rættiliga eldur í honum og løgreglan sigur, at tá ið hon kom á staðið var eldur í dekkunum og undir bilinum stóð í ljósum loga.

- Helst er eldur komið í evnið, sum er brúkt at rustviðgera bilin við, sigur løgreglan.

Sløkkiliðið varð boðsent og fekk sløkt eldin og tíbetur togað mannin út í síðstu løtu.

Løgreglan staðfestir, at maðurin var sera, sera heppin, tí hevði grannin onki varnast, kundi hann akkurát tað sama brent inni í bilinum.

Ásannast má, at klokkan sjey um morgunin er best at tørna inn – og so at tað heldur ikki so galið at hava góðar grannar....

Málið verður kannað og frágreiðing verður skrivað.

– Hetta er eitt sindur spesielt, men helst verður talan um eitthvørt brot á ferðslulógina, sigur vakthavandi.